

[www.oljan.fo](http://www.oljan.fo)

**Jan Müller** 05 - 01 - 2012

# 22 samdøgur at sigla við gassi úr Noregi til Japan

Gongst sum ætlað, verður tann fyrsta lastin av flótandi norskum gassi til Asia send við tangaskipi ígjøgnum landnyrðingsleiðina í summar. Tað fer at bera til, nú myndugleikarnir í Russlandi hava góðkent, at eitt tangaskip kann fara tann vegin við gassi. Landnyrðingsleiðin ella tann norðara siglingarleiðin millum Evropa og Asia er bara opin nakrar fáa mánaðir um árið, tí meginpartin av árinum liggur havið millum Sibir og Norðpólin undir ísi. Men tey seinnu árini er pólísurin minkaður, og tíðarskeiðið, har tað er gjørligt at sigla tann vegin, er vorðið støðugt longri, síðani tað fyrsta handilsskipið fór ígjøgnum landnyrðingsleiðina í 2009. Í fjør tóku 27 skip ta farleiðina, og roknað verður við uppaftur fleiri skipum í ár. Í oljuvinnuni hevur tann nýggja farleiðin stóran áhuga, og tangaskip við oljuúrdráttum hava longu roynt hana. Nú bendir so alt á, at tað fyrsta skipið við flótandi norskum gassi fer at royna ta nýggju leiðina í summar. Sambært heimasíðuni rederi.no hevur reiðaríið Knutsen OAS Shipping í Haugesund fingið loyvi frá teimum russisku myndugleikunum at senda tangaskipið "Ribera del Duera Knutsen" (myndin) ígjøgnum landnyrðingsleiðina við flótandi gassi úr Hammerfest til Japan. Ferðin er mett at taka 22 samdøgur og sostatt munandi minni, um skipið skuldi farið ígjøgnum Suez-veitina og Indiska Havið. "Ribera del Duera Knutsen" er tað einasta LNG-gasstangaskipið, sum hevur ísklassa 1A frá Det Norske Veritas, og skipið er tí væl egnað til landnyrðingsleiðina. Skipið verður tó ikki einsamalt, tá tað fer avstað í summar, tí vanliga fylgjast fleiri skip við russiskum ísbrótarum fremst og á halanum.